# Páll Finnur Páll sum teknirøð




*Páll, Finnur og Páll, soleiðis sum Heiðrikur á Heygum hevur teknað teir*

**Allir sangirnir hjá Páll Finni Páll verða í næsta mánaði givnir út sum fløgusavn og sum teknirøð.**

TÓNLEIKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hálvan november gevur tónleikabólkurin Páll Finnur Páll rúgvusmikið tilfar út. Í pakkanum, sum nevnist »Du ved, at gjørt er gjørt«, eru allar tríggjar fløgurnar og ein spildurnýggj live-fløga, sum varð upptikin á ólavsøku fyrr í ár.

- Vit eru fyrst og fremst ein live-bólkur, og vit hava leingi ætlað at geva eina konsert út á band. Tá vit hoyrdu ráupptøkurnar frá ólavsøkuni, vórðu vit ikki í iva, sigur Páll Oddur Rubeksen, annar sangarin í Páll Finnur Páll.

Í pakkanum er eisini ein teknirøð, sum listarmaðurin Heiðrik á Heygum hevur gjørt. Hann hevur gjørt eina mynd til hvønn sang og sett alt saman til eina søgu.

- Teknirøðin er ikki bara snøgg, hon er spennandi. Sangirnir fáa eina nýggja dimensjón, eina nýggja tulking frá einum øðrum listarligum horni, sigur Páll Oddur Rubeksen.

Allir sangtekstirnir eru prentaðir í húsanum. Akkordirnar eru tiknar við, so áhugað kunnu sita har heima og fylgja við.

- Fólk venda sær javnan til okkara at biðja um akkordirnar til ymisku sangirnar. Nú fáa tey alt í einum, sigur sangarin í Páll Finnur Páll, sum væntar at skipa fyri einari útgávukonsert miðskeiðis í november, tá pakkin kemur út.

Meir enn 40 sangir er á »Du ved, at gjørt er gjørt«. Tær báðar fyrstu útgávurnar, Bermenn frá 2003 og Førist frá 2005, hava verið útseldar í nøkur ár.

Heitið á pakkanum stavar frá einum lagi á Førist, sum nevnist Dýr Tíð.

- Vit hildu, at tað hóskaði rættiliga væl til savnið. Tú veitst, at gjørt er gjørt, men vit gera tað kortini, sigur Páll Oddur Rubeksen.

ST-DAGUR Í NORÐURLANDAHÚSINUM

JAVNSTØÐUNEVNDIN OG DEMOKRATIA SKIPA Á ST DEGNUM 24. OKTOBER FYRI TILTAKI UM CEDAW, SUM ER KVINNURÆTTINDASÁTTMÁLIN HJÁ ST

Tiltakið byrjar klokkan 15 og endar klokkan 17.

SKRÁIN FYRI TILTAKIÐ ER HENDAN:

ST – SÁTTMÁLAR – GERA TEIR NAKRAN MUN?
**Elin Mortensen,** stjórnmálafrøðingur og forkvinna í Amnesty International Føroya Deild

FØROYAR Á JAVNSTØÐULEIÐ – NIÐURSTØÐUR FRÁ CEDAW NEVNDINI
**Pól Egholm,** cand.merc., málsviðgeri á Sendistovu Føroya í Keypmannahavn, Uttanríkisráðið

RETHINKING EMPOWERMENT – CEDAW AS A TOOL
**Prof. Dr. Jur. Herdís Thorgeirsdóttir,** sakførari og lektari við Bifrost, lærustovn í Íslandi. Forseti í European Women Lawyers' Association, sí www.ewla.org

ORÐSTÝRARI VERÐUR DORIT HANSEN, CAND.MAG.
Tiltakið er alment og ókeypis.

JAVNSTØÐUNEVNDIN
DEMOKRATIA

